Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Helgi Abrahamsen, landsstýrismaður í umhvøris- og vinnumálum

Evni: Barsilsgjald

Spurningar:

1. Hví er barsilspeningur útgoldin afturút og á kontu fjórða gerandisdag í hvørjum mánaði?
2. Hvat ætlar landsstýrismaðurin at gera, so foreldur, ið fáa barsilspening, hava somu treytir, sum aðrir lønmóttakarar, og fáa pening á kontu seinasta í hvørjum mánaði?

Viðmerkingar:
Barsilsskipanin skal tryggja foreldur og barn fyrstu tíðina. Sum skilst, so mugu foreldur javnan bíða í nakrar dagar hvønn mánað, áðrenn tey fáa peningin á kontu.
Á heimasíðuni hjá TAKS stendur, at barsilspeningurin verður útgoldin eina ferð um mánaðin afturút og er vanliga á kontu fjórða gerandisdag í hvørjum mánaði.
Flestu foreldur hava fastar útreiðslur og kunnu tí koma í eina trupla støðu, um peningurin ikki er á kontuni innan fyrsta í einum mánaði.
Hetta er ein óheppin støða hjá foreldrum. Fyri at vita, um ætlanin er at broyta hetta, verður hesin fyrispurningur settur

Á Løgtingi, 9. august 2021

Beinta Løwe Jacobsen